# Kynbótaleiðari á Fiskaaling P/F

Av tí at leiðarin fyri kynbótaarbeiðnum hjá Fiskaaling P/F fer í annað starv, er eitt áhugavert og fjølbroytt starv leyst at søkja á Fiskaaling P/F.

Viðkomandi, ið settur verður, kemur at hava dagligu ábyrgdina av kynbótaarbeiðnum, og skal skipa og leggja hetta til rættis soleiðis, at arbeiðið verður framt undir tryggum og skipaðum umstøðum, soleiðis at allar neyðugar skrásetingar verða gjørdar og goymdar trygt til seinni nýtslu, í samband við úrvalið. Eisini kemur viðkomandi at hava ábyrgdina av samstarvinum við alistøðirnar, har merktur fiskur burtur úr kynbótaarbeiðnum verður aldur og skrásetingar um vekt, lit, kynsbúning og skap síðan verða gjørdar, tá laksurin verður tikin. Við støði í øllum skrásetingum sum gjørdar eru av hvørjum árgangi, skal kynbótaleiðarin síðan skipa fyri og gera familjuúrvalið.

Tann, ið settur verður, kemur at arbeiða í einum mennandi arbeiðsumhvørvi saman við góðum starvsfeløgum og fær møguleikar at menna seg víðari, við at luttaka á ýmsum skeiðum uttanlands.

**Førleikakrøv**
Vit hugsa okkum, at tann sum settur verður, hevur útbúgving frá hægri lærustovni og hevur holla vitan innan arvalæru, støðd- og hagfrøði. Umsøkjarar sum hartil hava praktiskar royndir innan alivinnuna og tá serliga frá støðum sum hava bygt sína framleiðslu á endurnýtslu av vatni hava fyrimun.

Hevur tú hug til stórar avbjóðingar, eitt ábyrgdarfult, viðkomandi og mennandi starv innan føroysku alivinnuna, kunnu vit bjóða tær alt hetta, umframt góðar arbeiðsumstøður og møguleika at menna teg víðari.

Starvið verður sett skjótast gjørligt og tann ið settur verður, kemur fyrstu tíðina at samstarva við verandi leiðara, fyri á henda hátt at fáa møguleika at seta seg skjótari inn í starvið. Lønin verður ásett eftir nærri avtalu, í mun til útbúgving og starvsroyndir.

Umsóknir við avriti av prógvum og møguligum ummælum, skulu sendast P/F Fiskaaling, Við Áir, FO - 430 Hvalvík, í seinasta lagi 25. sept. 2000. Vilja tygum hava nærri upplýsingar um starvið, kunnu tygum seta tygum í samband við P/F Fiskaaling, Símun Joensen, stjóra, telefon 474747 ella 214747, ella við telduposti: simun.joensen@fiskaaling.fo

### Lýsing av P/f Fiskaaling

P/F Fiskaaling er partafelag, har Føroya Landsstýri eigur allan partapeningin. Felagnum er álagt at standa fyri tí føroyska kynbótaarbeiðnum við laksi og sílum. Endamálið við kynbótaarbeiðnum, er at ala fram ein frískan fisk, sum hevur best møguligar eginleikar, soleiðis at føroyska alivinnan er betur kappingarfør á altjóða marknaðinum. Kynbótaarbeiðið byrjaði í 1991 og er seinastu árini ment, soleiðis at í dag verður valt út fyri allar eginleikar, sum til ber at hava við í kynbótaarbeiði við laksi. Fyrstu 5 árini hava 150 familjur verið tiknar við í kynbótaarbeiðnum, men frá 1999 at rokna er støðin víðari útbygd, soleiðis at til ber at hava 400 familjur við í úrvalinum. Eftir seinastu útbyggingina er føroyska kynbótaarbeiðið fult á hædd við kynbótaarbeiðið, sum verður gjørt í øðrum londum. Umframt at standa fyri kynbótaarbeiðnum er felagnum eisini álagt at menna nýggj fiskasløg til føroysku alivinnuna. Í hesum sambandi hevur felagið seinastu árini arbeitt við eini verkætlan innan aling av toski. Hendan er nú steðgað og felagið er farið í holt við eina verkætlan, sum hevur til endamáls at menna alingina av kalva. Sum liður í kynbótaarbeiðnum framleiðir felagið hartil 2000 - 3000 litur av laksarognum árliga umframt nakað av sílarognum. Samlaði umsetningurin í felagnum seinastu árini hevur verið umleið 25 mill. kr.

**P/F Fiskaaling**
Við Áir • FO-430 Hvalvík

## Løgmansskrivstovan

### Fulltrúi

Við hesum verður eitt starv sum løgfrøðingur á Løgmansskrivstovuni lýst leyst at søkja.

**Uppgávur**
Høvuðsuppgávan hjá løgfrøðinginum er lógararbeiði í sambandi við sjálvsstýrisverkætlanina. Harumframt skal fulltrúin luttaka í arbeiðinum, ið annars áliggur løgdeildini, t.d. gerð av løgfrøðiligum responsa, eftirkanning av lógaruppskotum hjá miðfyrisitingini og aðrar løgfrøðiligar uppgávur, eitt nú menning og samskipan av lóggávuarbeiðnum í miðfyrisitingini.

**Faklig førleikakrøv**
Sett verður sum krav, at umsøkjarar hava løgfrøðiligt embætisprógv.

**Persónlig førleikakrøv og royndir**
Umsøkjarar skulu hava góð samstarvsevni, vera áhitnir, miðvísir, kunna arbeiða sjálvstøðugt og vera til reiðar at royna nýggjar avbjóðingar. Umsøkjarar skulu harumframt hava góðan kunnleika til føroyskt mál.

**Løn og setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Búskapar- og løgfrøðingafelag Føroya. Setanarøkið fevnir um Løgmansskrivstovuna við tilhoyrandi stovnum og aðalstýrini.

**Vit kunnu bjóða**
Talan er um eitt fakliga krevjandi starv við nógvum avbjóðingum og við sera góðum møguleikum fyri eftirútbúgving.

**Nærri upplýsingar um starvið**
Møguligir umsøkjarar eru vælkomnir at seta seg í samband við Rúna Joensen, deildarstjóra, tlf. 351010, fyri at hoyra meira um starvið.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum, c.v. og møguligum viðmælum skulu sendast

**Løgmansskrivstovuni**
Postsmogu 64
110 Tórshavn

Umsóknir skulu vera á Løgmansskrivstovuni í seinasta lagi 27. september 2000 kl. 16.00. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

*Løgmansskrivstovan er fyrisiting hjá løgmanni og varaløgmanni. Løgmansskrivstovan er skipað í tríggjar deildir og tvær tænastueindir og hevur í høvuðsheitum tvørvegis og samskipandi uppgávur, eitt nú landsstýrisfundir, uttanlandsmál, umboðan, starvsfólkapolitikk, fyrisiting, nýskipan og sjálvstýrismál.*


**Kinesiska matstovan Nantong**

**BUFFÉ 59,-**
byrjar týsdagin 19/9

Fyllið ein bakka av buffé'ini og takið hann heim við. EINANS 59,-

Børn hálvan prís!

OPIÐ: Mánadag - Fríggjadag kl. 11.30-14.00

**Nantong**
Tinghúsvegur 8
3. hædd
Tel. 31 86 98

Sosialurin - 311820



**TILBOÐ**

÷10% av stálvaskum

÷20% av øllum kranum





*Vit hava eisini stórt úrval av baðirúmsmøblum.*
*Tilboðið heldur fram mánaðin út!*

**VVS-HORNIÐ**
**Lágpríshandil**
Landavegur 2 - 100 Tórshavn - Tel. 318023 - Fax 310963

Sosialurin - 311820



**Nýggjar TANNPROTESUR**
Broytingar og umvælingar av gomlum protesum

Kliniskur tannteknikari
**BERGUR Á REYNATRØÐ**
Børkuvegur, 620 Runavík
**Tlf. 448480**
Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 9-16



**Reyði krossur Føroya**

Sorgarlinjan hjá Reyða Krossi Føroya svarar mánad., mikud. og fríggjad. frá kl. 19[00] til 21[00]

☎ 212380




## Telefonbókin 2001

**Í mars 2001 verður telefonbókin fyri ár 2001 borin út til allar fastnetstelefonfelagar í Føroyum.**

Virki og stovnar skulu boða frá um lýst verður í Gulu síðum. Boðast skal eisini frá, um verandi lýsing ynskist óbroytt í næstu útgávu.



*Seinasta freist at lata broytingar inn er **týsdagin 31. oktober 2000***

**Hvítu síður**

Týsdagin 31. oktober 2000 er seinasta freist, at koma við rættingum til Hvítu síður í telefonbókini fyri ár 2001 (vanliga telefonyvirlitið). Rættingarblað til Hvítu síður er á síðu 548 í telefonbókini 2000, ið skal sendast til: Teknisk avgreiðsla, Føroya Tele, Postboks 27, FO-100 Tórshavn ella faks 31 79 68.

**Eykaupptøkur v.m.:**
Umframt rættingar til navn, bústað, telefonnummar, o.s.fr. ber eisini til at gera nakað serligt burturúr júst tínum telefonnummari, við undirstrikingum, eykaupptøkum og undirupptøkum. Prísurin er 57,50 kr. (íroknað mvg) fyri hvørja undirstriking, eykaupptøku ella undirupptøku.

**Búmerkið:**
Eisini ber til at umbiðja búmerki í Hvítu síðum. Prísurin fyri búmerki er 1.500,00 kr (ikki íroknað mvg).
Talið av búmerkjum í Hvítu síðum er avmarkað.

**Gulu síður**

Týsdagin 31. oktober 2000 er seinasta freist, at boða frá **av nýggjum**, um upptøka ynskist í Gulu síðum. Skrásetingar-/rættingarblað til Gulu síður er á síðu 547 í telefonbókini 2000, ið skal sendast til Teleforlagið.

**Prísir:**

| | | |
|---|---|---|
| (A)+(D) | Standardlýsing | kr. 650,00 |
| (B) | Stórt navn | kr. 50,00 |
| (C) | Innramming | kr. 100,00 |
| (E) | Grafisk lýsing pr. mm (min. 30 mm) | kr. 20,00 |

**Litlýsingar:**
Umframt vanligar svart/gular lýsingar, er eisini møguleiki at lýsa við hvítari bakgrund og við litum. Eykakostnaður fyri hvíta bakgrund er kr. 500,00 og fyri litir við hvítari bakgrund kr. 1.250,00.

**GG: Prísirnir á Gulu síðum eru uttan mvg!**

FØROYA TELE
**att: Teleforlagið**
**Postboks 27 · 110 Tórshavn · tel 30 30 30 · fax 30 30 31**
**www.nummar.fo · info@nummar.fo**

## Deildarstjórar í Vinnumálastýrinum

Tvey deildarstjórastørv í Vinnumálastýrinum til ávikavist vinnumáladeildina og samskiftisdeildina verða við hesum lýst leys til setan eftir nærri avtalu.

**Vinnumáladeildin**
Vinnumáladeildin stendur fyri at samskipa virksemið hjá landsstýrinum á vinnu- og arbeiðsmarknaðarøkinum. Ein høvuðsuppgáva er at lýsa teir karmar, sum tann almenni vinnupolitikkurin skapar fyri vinnulívið.

**Samskiftisdeildin**
Samskiftisdeildin stendur fyri at samskipa virksemið hjá landsstýrinum á samskiftis- og samferðsluøkinum. Ein høvuðsuppgáva er at lýsa teir karmar, sum tann almenna infraskipanin skapar fyri vinnulívið.

**Deildarstjórarnir**
Deildarstjórarnir hava hesar uppgávur:
- Ábyrgd av dagligu leiðsluni á deildini
- Ráðgeva stovnum
- Ábyrgd av lógararbeiðinum á deildini
- Taka fyrisitingaravgerðir innan málsøkini
- Vera limur í leiðslubólkinum í Vinnumálastýrinum
- Aðrar fyri starvið viðkomandi uppgávur

**Førleikakrøv**
Vit vænta okkum, at umsøkjararnir m.a. hava:
- Hægri útbúgving innan løgfrøði, búskaparfrøði, umsiting e.l.
- Royndir á økinum ella sum heild innan almenna og/ella privata fyrisiting
- Góð samstarvsevni, umframt mennandi leiðslustíl

**Vit kunnu bjóða**
Talan er um spennandi størv. Deildarstjórarnir vera við til at skapa karmarnar á hesum umsitingarligu økjunum, sum hava stóran týdning fyri alt stýrið.

**Løn og setanartreytir**
Setanin fatar um Vinnumálastýrið og stovnar undir tí, umframt Løgmansskrivstovuna og onnur aðalstýri. Størvini eru flokkað ájavnt 36. lønarflokki hjá Tænastumonnum Landsins, men eru tó ikki tænastumannastørv. Flokkingin verður endaliga av-greidd við viðkomandi yrkisfelag, tá ið starvið er sett.

Møguleiki er fyri, at starvsøkini verða víðkað/broytt, og mugu tey, sum sett verða, tola hetta.

**Umsóknir**
Umsókn við avriti av prógvum, CV o.ø. skulu sendast til:
**Vinnumálastýrið**
**Postrúm 377**
**FO-110 Tórshavn**

Umsóknarfreistin er 9. oktober 2000. Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Arna Poulsen, tel 35 60 60.

**V I N N U M Á L A S T Ý R I Ð**

## Umbýti av koyrikortum

Nú er seinasti møguleiki at býta gamla koyrikort sítt um við eitt nýtt koyrikort í ES-sniði. Sambært kunngerð nr. 5 frá 21. januar 1998 fara øll gomul koyrikort, ið ikki eru í ES-sniði úr gildi 31. desember 2000.

Koyring við gomlum ógildugum koyrikorti aftan á ársskiftið, verður av løgregluni sektað við 300 kr. í bót.

Umbýtið fer fram á Bileftirlitinum og uttan fyri Havnina á politistøðunum.

Tað kostar 250 kr. at umbýta koyrikortið. Við umbýti á politistøðunum, skal gjaldið vera goldið frammanundan, antin í banka ella á posthúsi.

Hav gamla koyrikortið við, væltrofna portrettmynd (hattleys), kvittan og møguligt navnabræv, um navnabroyting er farin fram.

Tórshavn, hin 7. september 2000
**Bileftirlit Føroya**
Hoyvíksvegur 57 • 110 Tórshavn
Tlf. 350400/fax 350401 • Teldupostur: bef@bef.fo


**Trygdarskógvar**
**Trygdarstivlar**
**Trygdarmaskur**
**Oyravernd o.a.**

**Tórshavnar Maskinhandil**
v/ Tummas Andreasen
Varðagøta 29-30 - Tlf. 313442


## Søkt verður eftir STÝRIMONNUM

Vegna danskt útgerðarfelag verður søkt eftir tveimum royndum og álítandi yvirstýrimonnum til produkttangaskip.

Krøv: Skipsføraraprógv av 1. stigi og GMDSS og annars tey vanligu tíðarkravdu skeið og heilsuprógv, ið siglandi skulu lúka, smbrt. altjóða reglur.

Skrivlig umsókn verður at senda til:

TOR SHIPPING
**Box 1252 · 110 Tórshavn**

## Fuglafjarðar Javnaðarfelag

2. og møguliga 3. uppstillingarfundur til kommunuvalið verður í Ítróttarhúsinum í Fuglafirði mikukvøldið kl. 20.

**Fuglafjarðar javnaðarfelag**

## Tjalddurs Apotek

Frá 1. oktober 2000 eru telefon og telefax nr. okkara broytt til:

| | |
|---|---|
| Vekslarin: | nr. 341100 |
| Høvuðstelefax: | nr. 341195 |

TJALDURS APOTEKIÐ

*Lýsið í* **sosialinum**